## Amager við trimum føroyingum

Hans Jørgensen, Erling Jacobsen, Amed Davy Sylla og Páll Klettskarð vóru allir í byrjunaruppstillingini, tá FC Amager tapti fyri Herfølge í gjár. Herfølge vann 2-1, eftir at gestirnir vóru á odda 1-0 í steðginum. – Vit kundu ikki byrja í sterkastu uppstilling, og fleiri av teimum ungu fingu møguleikan. Teir stóðu seg eisini væl. Hans Jørgensen gjørdi smá mistøk, men royndist samanumtikið væl. Erling Jacobsen spældi eisini væl. Stórt rós til liðið, sum hevði betur uppiborið, sigur Julian Hansen, hjálparvenjari, við heimasíðuna hjá FC Amager.




## FSF-álmanakkin fæst nú

Veggjaálmanakkin hjá Fótbóltssambandinum kann nú eisini avheintast á Magn-støðunum kring landið. Á álmanakkanum 2009 eru upplýsingar um, nær landsdystir eru og nær altjóða dystir verða spældir. FSF hevur gjørt avtalu við Magn um at lata bensinstøðunum nøkur eintøk av álmanakkanum, sum so lata áhugað fáa teir ókeypis. Eisini ber til at fáa fatur á FSF-álmanakkanum 2009 á Føroya Bjór-útsølunum í Klaksvík og í Havn.

EM-undankapping: Sveis-Føroyar 35-21 (15-8)

# Avsmurningur í Alpunum

**Sveisiska liðið var nógv meira ágangandi í dystinum niðri í Sveis leygarkvøldið, enn tað var í dystinum í Føroyum mikukvøldið. Og føroyska liðið megnaði bara í løtum at fylgja við.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Føroyar fingu ongantíð fatur í Sveis leygarkvøldið, tá millum annað Iwan Ursic á strikuni var meira, enn Rúni Joensen, Bárður Johannesen og Hans Áki Dal-Christiansen megnaðu at gera nakað við*

*Mynd: Alexander Wagner*

Tað var heilt annað og meira ágangandi spæl, ið Sveis vísti leygarkvøldið, tá Føroyar vóru gestir framman fyri 1.200 larmandi heimaáskoðarum í alpubygdini Appenzell. Og tá avtornaði, gjørdist tað til ein rættan avsmurning, tí heili 14 mál vóru á muni.

At byrja við sá ikki so heilt galið út. Sveis kom upp á 3-1 og hevði møguleikan at økja, tá Lars L. Black, sum byrjaði í føroyska málinum, bjargaði brotskasti. Og løtuna eftir minkaðu Føroyar um munin, so bara eitt mál var á muni eftir fyrsta korterið í dystinum, tá støðan var 6-5 til Sveis.

Men so stóð bara fast, og í einar 10-11 minuttir eydnaðist ikki Føroyum at skora eina einastu ferð, meðan Sveis streyk avstað og økti til 12-5. Tá tóku føroysku venjararnir ein taktiskan steðg, sum vísti seg at rigga, tí í næstu løtuna skoraðu Føroyar trý mál og sóu út til at vera við aftur.

Tað helt kortini ikki, tí Sveis svaraði væl aftur og var á odda 15-8 í hálvleiksteðginum. Neyvan var tann munurin heldur til at tosa seg frá, tí sveisiska liðið var klárt betri í allar mátar. Longu nú var tað bara ein spurningur um støddina á sigrinum.

### Aftur skjótálop

Føroysku spælararnir vóru nóg illa komnir í gongd í seinna hálvleiki, tá Bárður Johannesen fekk reyða kortið eftir sína triðju útvísing í tveir minuttir, og tískil mátti hann uppliva restina av dystinum sum áskoðari.

Og hóast Levi Nybo tók eftirfylgjandi brotskastið, var tað stokkutur uggi, tí Sveis tóktist vilja halda fram í somu øði sum seinna partin av fyrra hálvleiki. Føroysku spælararnir høvdu megnað at tikið broddin av sveisisku skjótálopunum, ið vóru mønustingurin mikukvøldið, men nú møðin eisini fór at síggjast, gjørdust skjótálopini eitt vápn, sveisararnir fingu meira og meira burturúr.

Verjan megnaði ikki longur at halda tørn og tá málverjarnir heldur ikki høvdu ein av sínum bestu døgum, øktist munurin alsamt. Sjálvt ikki, tá stórir føroyskir møguleikar vóru í hinum endanum, megnaðu føroysku spælararnir at vera nóg kaldir, so tí kom alt ov lítið inn á málkontuna.

Har var snøgt sagt ov stórur munur á, og Sveis vísti seg frá einari heilt aðrari síðu enn mikukvøldið, og tað var meira, enn føroyska liðið megnaði at stríðast ímóti. Tá avtornaði, vann Sveis 35-21 og fekk staðfest, at styrkismunurin á Føroyum og hinum liðunum enn er so stórur, at tað í komandi dystum helst fer at snúgva seg mest um at avmarka tapini.

### FAKTA um dystin

EM-undankappingin, bólkur 2
Sveis-Føroyar 35-21 (15-8)
10 min: 5-3
20 min: 9-5
30 min: 15-8
40 min: 21-12
50 min: 30-18
Málskjúttar
Føroyar: Heini Hanusarson 8, Sámal Joensen 4 (1), Finnur Hansson 3, Carl Herup Olsen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Regin Joensen 1, Ingi Olsen 1
Sveis: Marco Kurth 6, Manuel Liniger 6 (1), David Graubner 5, Andre Schmid 5, Daniel Fellmann 3, Marko Vukelic 3, David Parolo 2, Martin Engeler 1, Fabian Ganziger 1, Marcel Hess 1, Mathias Oltmanns 1, Iwan Ursic 1
Brotskøst: Sveis 3, Føroyar 1
Ávaringar: Sveis 2, Føroyar 3
Útvísingar: Sveis 5, Føroyar 5
Diskvalifikatión: Føroyar 1
Dómarar: Vahit Ersan & Faruk Akman (Turkaland)
EHF-eygleiðari: Alex Klein (Ísrael)

# Sveis vildi ikki geva dystin leysan

**– Hóast avtalan var, at øll londini framleiddu sínar heimadystir, fingu vit ikki fatur í útidystinum ímóti Sveis leygarkvøldið, sigur programleiðarin í Kringvarpi Føroya, Herluf Sørensen.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Europeiska hondbóltssamgongan, EHF, hevur sín stóran áhuga í, at hondbólturin vinnur fram, og tí var undan EM-undankappingini gjørd ein avtala um, at øll hondini skuldu framleiða sínar heimadystir til sjónvarpsbrúk.

Út frá tí syrgdi Kringvarp Føroya mikukvøldið fyri, at dysturin ímóti Sveis var framleiddur og sendur, men tá Føroyar leygarkvøldið spældu á útivølli ímóti Sveis, var eingin dystur at síggja í sjónvarpinum.

– Dysturin var framleiddur, men tíverri kundu vit ikki fáa fatur í honum. Í besta føri fáa vit seinni ein samandrátt, men einki røkist fyri, at vit fáa allan dystin, sigur Herluf Sørensen, programleiðari í Kringvarpinum.

– Í grundini kenna vit okkum eitt sindur lumpað, tí vit hildu, at avtalan tryggjaði okkum útidystirnar, tí vit framleiddu heimadystirnar. Men soleiðis var altso ikki í hesum føri, og vit fingu tí ongan dyst at vísa.

### Vildu einki gjalda

Kringvarpið hevði upprunaliga fingið at vitað, at dysturin í Sveis leygarkvøldið ikki fór at verða framleiddur. Men sveisarar vildu kortini hava ein samandrátt frá Kringvarpinum av dystinum mikukvøldið. Tað fingu teir ikki.

– Teir spurdu, um teir kundu keypa framleiðsluna, men tá teir ikki kundu bjóða ein ordiligan prís, vildu vit ikki selja, sigur Herluf Sørensen, sum harmast um, at sjónvarpið ikki kundi vísa landsliðshondbólt úr Sveis.

– Vit frættu so, at dysturin varð framleiddur kortini, men tá avtornaði, vildu teir ikki geva hann leysan. Vit máttu tí taka dystin av skránni aftur.

Tey einastu, sum tí hava sæð nakað til Sveis-Føroyar á einum sjónvarpsskíggja, eru tey í føroyska ferðalagnum, sum seinni leygarkvøldið kundu síggja ein lítlan samandrátt á einari av rásunum, sum eru í Sveis. So fæst at síggja, um tann samandrátturin nakrantíð kemur hendavegin.